# Akraborg og Varðborg lagdar

**Tær avreiddu hósdagin og á Tvøroyri loysa ikki aftur. Roynt verður nú at selja tær og onkur fyrispurningur er uttanlands**

SKIPASØGA
*Áki Bertholdsen*



*Her kemur Akraborg at bryggju at avreiða fyri seinastu ferð. Mikukvøldið kom hon á Tvøroyri at avreiða og nú er hon løgd. Varðborg er úti í fjørðinum á veg at bryggju og hon er eisini løgd. Sostatt er eitt langt kapittul í føroyskari skipasøgu endað*

Nú er tynnist í tí gamla fiskiflotanum og nú syngja aftur tvey fiskiskip sín svanasong.

Tað hendi mikukvøldið, tá ið partrolararnir báðir, Akraborg og Varðborg, komu á Tvøroyri at avreiða. Tí nú verða tær báðar lagdar og loysa ikki aftur. Samstundis er manningin søgd upp.

Bátarnir verða nú riggaðir av og síðani verða teir lagdir við bryggju norðanfyri.

Tummas Justinussen í Leirvík, sum er í felagnum ið eigur bátarnar, sigur, at ætlanin var ongantíð, at skipini skuldi verða verandi í flotanum.

– Tey skuldu úr flotanum undir øllum umstøðum næsta ár, tá ið nýggja Stjørnan og nýggja Polarhav koma.

Men nú er ymiskt at gera við Akraborg og Varðborg, eitt nú eftir kravi frá Skipasýninum.

– Harafturat er upsaprísurin farin í botn. Og tá ið vit hava hava roknað fyri og ímóti er úrslitið, at loysti seg heilt einfalt ikki at gera neyðugu ábøtur á tey fyri at hava tey siglandi í nakrar fáar mánaðir afturat.

Tummas Justinussen sigur, at roynt verður nú at selja Akraborg og Varðborg.

Onkrir fyrispurningar eru uttanlands, men onki ítøkiligt.

Vágbingar áttu bátarnar, men seldu teir til Rávuna í Sørvági fyri nøkrum fáum árum síðani við fiskiloyvum og øllum.

Men so keyptu Rávan gomlu Stjørnuna og Polarhav úr Lorvík og lorvíkingar fingu Akraborg og Varðborg í býti og soleiðis endaðu teir í Lorvík.

Men ætlanin var alla tíðina, at teir skuldu úr flotanum, tá ið nýggja Polarhav og stjørnan koma til landið næsta ár.

Eitt triðja skip, Brilliant, er longu farin úr flotanum fyri nýggju Polarhav og Stjørnuna og sostatt eru tríggir bátar farnir úr flotanum fyri teir nýggju bátarnar.

Manningin fylgdi við Akraborg og Varðborg allan vegin, men tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at teir, sum hava verið við Stjørnuni og Polarhav øll árini, skulu eisini umborð á teir nýggju bátarnar og tí er manningin á Akraborg og Varðborg søgd upp.

Sostatt er aftur eitt kapittul í føroyskari skipasøgu endað. Men hetta var eitt av teimum drúgvaru. Bæði skipini eru farin um tey 40 árini.

Akraborg er bygt í Brattvåg í Noregi í 1961, men hon varð umbygd á Skála í 1969 og longd í Skagen í 1982.

Varðborg er bygd í Tórshavn í 1963, men hon varð longd á somu skipasmiðju í 1968 og umbygd í Skagen í 1981. Hon nevndist fyrr Þorkerisnes og Tummas T.

Hesin síðsti túrurin hjá parinum var vánaligur, teir høvdu ikki meiri enn 700-800 kassar, nú teir avreiddu á Tvøroyri.

# Leypa ikki á leistum

**Vágs Býráð ætlar at kanna málið nærri, áðrenn støða verður tikin til ein fyrispurning frá Tvøroyrar Kommunu um meiri kommunalt samstarv**

KOMMUNALT SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*



*Vágbingar ætla at kanna málið nærri, áðrenn tað vilja teir hvørki svara ja ella nei upp á fyrispurning frá Tvøroyrar Býráð*

**Suðuroy:** Roynt verður nú at fáa størri kommunalt samstarv í lag í Suðuroy.

Tað er Tvøroyrar Býráð, sum hevur tikið stig til at endurstovna felagskommununa, sum varð í Suðuroy fyri nøkrum árum síðani.

Tvøroyrar Kommuna hevur tískil sent øllum kommununum fyrispurning um tær eru sinnaðar at taka samstarv upp aftur í eini felags kommunu fyri oynna.

Felagskommuna varð skipað í Suðuroy fyrst í nítiárunum og hon hevði eisini nakrar fundir tá. Men tað gingu bara nøkur heilt fá ár, so datt felagsskapurin niðurfyri aftur longu miðskeiðis í nítiárunum.

Eftir reglugerðini fyri felagskommununa í Suðuroy, er tað størsta kommunan, sum tekur stig til fundirnar eftir hvørt kommunuval og tí hevur Tvøroyrar Kommuna sent hinum kommununum fyrispurning um áhugi er fyri at taka samstarvið upp aftur.

Er áhugi fyri tí hjá hinum kommununum, er Tvøroyrar Býráð sinnað at kalla saman til fundar at endurstovna felagskommununa.

Tvøroyrar Kommuna heldur, at ein felagskommuna kundi verðið ein styrki fyri Suðuroynna, tí so kundi oyggin staðið sum ein maður, tá ið mál av felags áhuga vóru uppi.

Málið var til viðgerðar í Vágs býráð mikukvøldið, men tá varð greitt, at vágbingar ætla ikki at taka av uttan víðari.

Býráðið í Vági samtykti at kanna eftir, hvat lá í fyrispurninginum um meiri samstarv, hvussu hetta samstarvið skuldi skipast og, hvat samstarvast skal um.

Tí vildi býráðið ikki taka støðu til fyrispurningin, men fer at taka tað upp aftur eftir summarfrítíðina.

Annars hevði Hvalbiar Kommuna fyrispurningin til viðgerðar fyri stuttum og har samtykti bygdaráðið, at tað var sinnað at vera við í einum slíkum samstarvi, verður tað skipað.

## Taka stig til at friða Vág fyri seyð

**Vágs Býráð ætlar sær nú fara undir arbeiðið at vetrarfriða Vág**

VETRARFRIÐING
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Nú er ætlanin at vetrarfriðað Vág fyri seyð.

Tað ætlar Vágs Býráð nú.

Tekniska deild hjá Vágs Býráð hevur nú fingið heimild at taka upp samráðingar við hagarnar, sum hoyra til Vág um at fáa býin vetrarfriðaðan fyri seyð.

Hetta er eitt gamalt mál í Býráðnum, men tað er ongantíð komið víðari, men tað er so ætlanin at gera nú.

Jógvan Krossá, borgarstjóri, sigur, at ætlanin er nú at taka málið upp frá botni av og at fáa tað gjøgnumført, men tað tekur tíð.

Verður Vágur vetrarfriðaður, kemur kommunan undir endugjald til hagarnarfyri mist vetrarbit. Og tað kostar ikki lítið, tí kommunan er so víðfør.



# Hugnalig vitjan

**Túrurin hjá ráðgevandi Føroya nevndini á Fólkatingi í Føroyum eydnaðist til fulnar. Nú er vitanin og samskiftið vorðið nógv betur, sigur formaðurin í nevndini**

VITJAN
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Teir ellivu limirnir í Føroya nevndini sluppu eisini at síggja eitt sindur av Føroyum. Her hyggja tey seg kring úti á Reyni*

Tað var ein avslappað forkvinna í serligu Føroya nevndini á Fólkatingi, sum kom at hitta føroysku fjølmiðlarnar hósdagin.

Fólkatingslimurin fyri Venstre Pia Larsen er formaður fyri 21-mands-udvalget vedrørende Færøerne. Ein nevnd, sum hon sjálv á heimasíðu sínari sigur hava til uppgávu at viðgera spurningar viðvíkjandi einari møguligari føroyskari loysing. Nevndin er ikki meira enn trý ára gomul. Tað var táverandi forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, sum setti nevndina á stovn fyri at fylgja samráðingunum og geva ráð til stjórnina. Nú er so sum so við samráðingum, men nevndin livir enn, hóast formaðurin ásannar, at nakað er tikið av ferðini.



*Pia Larsen úr Venstre er formaður fyri serligu Føroya nevndina á Fólkatingi*

Í gulari polotroyggju og einari føroyskari troyggju afturat kom hon, eftir fund við Løgtingið, at hitta umboð fyri føroysku fjølmiðlarnar.

Við sær hevði hon Edmund Joensen, løgtingsformann, sum tó hevði funnið klædningin úr skápinum.

Vitjanin hjá serligu Føroya nevndini er av kunnandi slagnum. Vitjað hevur verið á ymsum virkjum, m.a. Havsbrún í Fuglafirði. So vóru fundir við Landsstýrið, Vinnumálaráðið og formenninar fyri politisku flokkarnar.

Vitjanin hevur riggað ótrúliga væl. Vit hava fingið alt tað burturúr, sum vit kundu ynskt okkum, sigur Pia Larsen.

Tað vóru kortini ikki allir 21 limir við í Føroyum. Ellivu íroknað Lisbeth L. Petersen komu til Føroya – umvegis ein lítlan mjørkatúr til Bergen. Umboð fyri seks av átta flokkum á Fólkatingi vóru við.

Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at vit eru væl inni í føroyskum viðurskiftum. Og tá fleiri av limunum ongantíð áður hava verið í Føroyum, so er tað upplagt at koma á vitjan. Hesin túrurin hevur eisini betra vitanina hjá limunum nógv og ikki minst samskiftið við føroyskar politikarar, sigur Pia Larsen.

### Tørvur

Á fundunum við floksformenninar og landsstýrið hava ymisk mál verið uppi og vent. Men farið varð ikki í dýpdina við nøkrum einstøkum máli. Og avrátt varð bert, at hetta samskiftið var til gagn fyri allar partur, og ynskiligt er, at hetta heldur fram.

Flogvøllurin, skuldin hjá Føroyum, vinnulívið og onnur mál vóru fyri á fundunum.

Tá spurt varð, um nevndin sum so hevði nakað endamál, helt Pia Larsen, at tað hevði nevndin so avgjørt. Nevndin hevur ein stóran leiklut, tí talan verður um persónligt samskifti millum politikarar, og sleppast kann undan óneyðugum misskiljingum, helt hon.

Eisini Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard taka undir við, at tað hevur stóran týdning, at parlamentarikarnir sleppa at skifta orð, soleiðis alt samskiftið ikki fer fram umvegis stjórnina og landsstýrið.

Í komandi viku kemur Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, á almenna vitjan í Føroyum.

Søren Søndergaard og Aage Frandsen, fólkatingslimir:

# Danmark skyldar íløgur til flogvøllin

**Donsku fólkatingslimirnir Aage Frandsen og Søren Søndergaard meta, at danir mugu gera íløgur í flogvøllin í Vágum, áðrenn hann verður yvirtikin**

FØROYA PRÁT
*Heri á Rógvi*



*Aage Frandsen og Søren Søndergaard, báðir fólkatingslimir, eru báðir av teirri greiðu fatan, at danir mugu gera íløgur í flogvøllin, áðrenn hann verður yvirtikin, um hetta er neyðugt*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Á gongugøtuni í Havn finna vit teir báðar fólkatingslimirnar og limir í Føroya nevndini á Fólkatingi, Aage Frandsen frá SF (Socialistiskt Folkeparti) og Søren Søndergaard, Enhedslisten. Við posunum fullum av ullavørum spáka teir sær ein túr í føroyska høvuðsstaðnum. Teir eru skjótir at yvirtala til eitt prát.

Júst Enhedslisten og SF eru kendir fyri teirra vinarliga politikk í málum, ið víkja Føroyum.

Báðir flokkar atkvøddu fyri uppskotinum hjá Tórbirni Jacbosen um at avtaka herðanarligu revsilógirnar í Føroyum.

– Vit hava fingið váttað, at tað er ótrúliga týdningarmikið, at vit frá danskari síðu virða tey ynskju, sum eru í Føroyum um at fáa meira at siga í egnum húsi, sigur Søren Søndergaard.

Vit spyrja eisini, um hendan góða 21 manna nevndini hevur nakað endamál longur. Er tað pengarnar og stríðið vert?

Um nevndin hevur nakra meining longur, kann mann gott seta spurnartekin við. Vit eru í øllum vorðin klókari av hesari vitjanini, men tað kundu vit eisini verið á annan hátt. Upprunaliga tankagongdin við hesari nevndini var at sleppa undan ov nógvum sjálvstýri í Føroyum, tá føroyingar fóru ígongd við at samráðast um hetta. Men vit kunnu so brúka tað til nakað annaðí dag og fáa betri kunning, sigur Aage Frandsen.

### Flogvøllurin

Eitt mál, sum hevur verið uppi og vent á fundunum hjá Føroya nevndini við bæði landsstýrið og floksfermenninar eru flogvøllurin í Vágum.

Tann framferðarhátt, stjórnin nýtir í sambandi við føroysk ynski um størri sjálvstýri er ikki tann rætti. Serliga tá hugsað verður, at tað, sum danskari staturin eigur í Føroyum, má vera í lagi.

Og her hugsi eg serliga um flogvøllin, sum bíðar eftir einari iløgu, ið danski staturin skyldar fyri einar 200 milliónir.

Og hin fólkatingslimurin er heldur ikki ósamdur.

– Vit skulu sjálvsagt lata flogvøllin verða yvirtiknar í einari støðu, har hann kann virka uttan undaksloyvi. Tað má vera púra klárt, at flogvøllurin eins og alt annað, tú letur frá tær, eigur at virka uttan undantak, sum talan er um nú. So mugu pengar til knýtast aftur, sigur Søren Søndergaard.

Er tað ikki lættari hjá tykkum at koma við tílíkum, tá tit sita í andstøðu?

Tað er klárt, at tað er altíð lættari sum andstøðu, men vit koma væl einaferð at sita í stjórn ella vera partur av grundarlagnum fyri einari stjórn, og tá verða vit noyddir at halda hesi lyfti, sigur Søren Søndergaard.

### Straffilógirnar

Hetta við herðanarligu revsilógini, har Fólkatingið tvingar nakað útyvir føroyskar myndugleikar. Hetta kann ikki góðtakast, sigur Søren Søndergaard, uttan at vit noyðast at biðja hann koma inn á hetta.

Sum nevnt atkvøddu bæði SF og Enhedslisten fyri uppskotinum um at avtaka herðnaðarligu revsilógirnar. Og báðir eru teir púra samdir um, at hetta ikki eigur at koma fyri.

Málið varð eisini reist á fundunum í Føroyum.

Aage Frandsen, Søren Søndergaard og hini limirnir í Føroya nevndini á Fólkatingi fóru aftur til Danmarkar fríggjadagin.